

r Jan Arge Jacobsen, sum stóð fyri føroysku kanningunum

Mynd: FRS

sum eingin svartkjaftur at síggja.

- Í fjør stóð svartkjafturin saman við sildini, men í ár var bert sild at síggja.

Miðallongdin á svartkjafti var umleið 27 cm., og miðalvektin var 105 gram.

Jan Arge Jacobsen sigur, at lítið var at síggja av prikkafiski norðanfyri.

- Hinvegin var nógv krill at síggja í mest sum øllum økinum, bæði ovarlaga (100-200 m) og á djúpum vatni (250-500 m). Av og á stóð eisini nógv krill í netinum, tá ið hálað varð, sigur fiskifrøðingurin.

# andoynnni

vinnulívi, fiskaflutning, pendlarar, nemingar og onnur.

• Ferðavinnan verður styrkt munandi.

• Suðuroyingar hava møguleika til at fáa nógv fleiri túrar við eini Suðurleið.

• Betri møguleikar at flyta orku, her verður hugsað um háspenningskápul ígjøgnum tunnilin.

• Møguleika til alternativa orku so sum alduorka, vindmyllur.

• Møguleikar við avlopsgróti.

**Vansar um tunnil ikki kemur:**

• Suðuroy og Sandoy koma við tíðini at verða eftirbátar og koma sum frálíður at armast út sum samfeløg.

**Fyrilestrahaldarar verða:**

• Dávur Reinert Hansen
• Svein Kristiansen
• Oyvindur Brimnes

Fyriskiparar eru politisku valfeløgini í Sandoynni:

Folkaflokkurin, Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sambandsflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin.

Kontaktpersónar fyri fyriskiparanar eru Ingimar Thomsen og Wiljam Sand Davidsen.

# Knút Háberg Eysturstein á Spot Festivalinum

**Enn eitt føroyskt tónleikanavn er komið á skránna fyri Spot Festivalin í Århus, talan er um leirvíkingin Knút Háberg Eysturstein, ið skal spæla tvær kirkjukonsertir**

FESTIVAL SUMMARIÐ
*Niels Uni Dam*
nielsuni@sosialurin.fo




*Mynd: Knút er ein frálíkur urguleikari, inniligur sangari og fínur gittarleikari*

*Mynd: Niels Uni Dam*

Ljómborðsleikarin í Marius, Gestum og bólkinum hjá Peturi Pólsyni, Knút Háberg Eysturstein, fer saman við gittarleikararnum Boga á Lakjuni, at spæla á ársins Spot Festivali. Frammanundan er greitt, at 200, The Dreams, Høgni Lisberg, Teitur og Valravn spæla á festivalinum.

Hetta eru øgiliga nógv føroysk nøvn, og skal hetta í ein stóran mun síggjast, sum úrslit av stóra arbeiðinum, ið Norðurlandahúsið hevur gjørt fyri, at fáa innivist fyri føroyskum tónleiki á stóra ídnaðarfestivalinum.

Sum einstaklingur gav Knút Háberg Eysturstein í 2004 frálíku fløguna Havsglóð út. Á hesi fløgu upplivdu vit lagskrivarin Knút Háberg Eysturstein. Hesin er bæði inniligur og dugnaligur. Røddin hjá Knút er heilt serlig, og hann syngur við nógvar innlivan. Afturat sær hevur hann ein flokk av sera dugnaligum tónleikarum.

Knút byrjaði sítt tónlistarliga yrki, sum gittarleikari í bólkum sum Marigold og avleggaranum Mary's Baby. Men tað var, sum urguleikari í Gestum, at Knút flutti seg inn í føroysku tónleikatilvitskuna. Hann hevur eisini í Marius og í einstaklingaverkætlanini hjá Peturi Pólson víst seg, sum ein sera habilan urguleikara, ið hevur átt ein stóran leiklut í heildarmyndini hjá hesum bólkum. Saman við júst Petur Pólsyni hevur Knút seinastu tíðina spælt mótmælistónleik undir navninum Tuxedo Rebels. Tað er frammanundan greitt, at Knút spælir á asfalt, ið er sama vikuskiftið sum Spot festivalurin. Men hetta er ikki ein trupulleiki, tí konsertirnar við Knúti eru sokallaðar præ-spot kirkju konsertir, mánadag 29. mai kl 20 í Vor Frue Kirke og týsdag 30. mai kl 20 í Skæring Kirke Á konsertunum spælir eisini dansk/svenski bólkurin Lampshade.

# Seinasta avrættingin á Selatrað var í 1627

**Leygardagin fer Max C. Weihe at halda almennan fyrilestur í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tað er Ættarbandið, sum skipar fyri tiltakinum**

FYRILESTUR
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Leygardagin skipar felagið Ættarbandið fyri almennum fundi við áhugaverdum fyrilestri í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.

Tað verður Max C. Weihe, sum fer at hugleiða um bygdina, Selatrað, og sjálvur fyrilesturin verður klokkan 15.

Maria Jacobsen, sum er formaður í Ættarbandinum, sigur, at Selatrað er ógvuliga gomul bygd, sum hevur eina áhugaverda bóndasøgu.

- Á Selatrað var tingstaður, og har var eisini gálgi. Seinast, nakar varð hongdur í gálgan, var í 1627; hetta var fyri stuldur.

Maria sigur, at øll, sum hava áhuga fyri søgu og ættargransking, eru vælkomin.

- Vit vóna at síggja nógv fólk í Kvinnufelagshúsinum, leggur hon aftrat.

Á almenna fundinum hjá Ættarbandinum verður eisini annað á skránni, og Maria Jacobsen veit at siga, at døgurði verður klokkan 18.

- Tey, sum ætla sær at verða við til døgurðan, mugu boða felagnum frá.

Í nevndini í Ættarbandinum eru: Maria Jacobsen, formaður, Elin Midjord, næstformaður, Jóna Lindenskov, skrivari, Katrin Mørkøre, kassameistari og Andrass Joensen.

Tey, sum ynskja at frætta meira um tiltakið hjá Ættarbandinum, kunnu venda sær til Mariu á tlf. 447391/ 226718.